# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 12/00052 | Lóg: Lóg um Toll- og Skattafyrisiting § 24 | Avgerð tikin: 26.03.2012 |
|---|---|---|

## Kærufreist. Broyting av siðvenju í mun til at rokna kærufreistina.

**Samandráttur:**

**Í sambandi við viðgerð av málum um kærufreist hevur kærunevndin havt sum siðvenju at rokna 3 postdagar í sambandi við, at kæran verður send millum partarnar í málinum. Vísandi til tað óregluligu postgongdina, sum hevur verið í longri tíð, hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin tó avgjørt at broyta siðvenju soleiðis, at 5 postdagar nú verða roknaðir í sambandi við viðgerð av málum um kærufreist. Kært var tí ikki ov seint í hesum máli.**

### Avgerð

Skatta- og avgjaldskærunevndin hevði fund 26. mars 2012, har støða varð tikin til spurningin um kærufreistina í hesum máli.

Sambært § 24, stk. 2, síðsta pkt. í lóg um Toll- og skattafyrisiting, skal kæra vera send, áðrenn 4 vikur eru lidnar frá tí, at kærandi fekk boð um avgerðina.

Í sambandi við viðgerð av málum um kærufreist hevur kærunevndin havt sum siðvenju at rokna 3 postdagar í sambandi við, at kæran verður send millum partarnar í málinum.

Sambært hesi siðvenju skuldi kæran í hesum føri verið send í seinasta lagi 17. februar 2012, sum er fýra vikur frá, at kærarin kundi roknast at hava móttikið avgerðina í málinum. Kæran er dagfest 20. februar 2012, og er sostatt í fyrsta lagi send hendan dag, og kært var sostatt ov seint.

Vísandi til tað óregluligu postgongdina, sum hevur verið í longri tíð, hevur Skatta- og avgjaldskærunevndin tó avgjørt at broyta siðvenju soleiðis, at 5 postdagar nú verða roknaðir í sambandi við viðgerð av málum um kærufreist.

**Kæran varð tí mett at vera rættstundis og verður tikin til viðgerðar.**